# VEGLEIÐING UM EFTIRLIT VIÐ DÁTUVIÐGERUM

**Juli 2021**

**1. útgáva**

Dátueftirlitið

# Innihaldsyvirlit


1. **Innleiðsla** ............................................................ 2
2. **Hví er neyðugt at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum?** ........................ 3
3. **Hvør kann hava eftirlit við viðgerðar-trygdini hjá einum dátuviðgera?** ......................... 4
4. **Hvussu kann eftirlit við viðgerðar-trygdini hjá einum dátuviðgera skipast?** ................. 5
5. **Hvussu ofta eigur viðgerðartrygdin hjá einum dátuviðgera at kannast?** ....................... 7
6. **Hvussu við viðgerðartrygdini hjá undirdátuviðgerum?** .................................................. 8
7. **Mannagongd hjá dátuábyrgdara fyri  eftirlit við dátuviðgera** ........................................ 9

# 1. Innleiðsla

Dátueftirlitið hevur staðfest, at tað er trupult hjá fleiri dátuábyrgdarum at halda skyldurnar í dátuverndarlógini tá umræður

1) at gera skriftligar dátuviðgeraravtalur við dátuviðgerar

2) at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum

Dátueftirlitið hevur gjørt eina skabelón til dátuviðgeraravtalu[1], sum innihaldsliga lýkur krøvini í dátuverndarlógini. Hugsanin við skabelónini er, at dátuábyrgdari og dátuviðgeri kunnu brúka hesa eftir vild og tillaga hana eftir tørvi, og soleiðis halda skylduna í dátuverndarlógini um at gera eina skrivliga dátuviðgeraravtalu.

Hin skyldan, sum dátuábyrgdari sum brúkar dátuviðgerar hevur, er at hava eftirlit við viðgerðartrygdini[2] hjá dátuviðgerunum. Her skal dátuábyrgdarin taka støðu til ymiskar spurningar, sum verða viðgjørdar í hesi vegleiðing:

- Hví er neyðugt at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum?
- Hvør kann hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá einum dátuviðgera?
- Hvussu kann eftirlit við viðgerðartrygdini hjá einum dátuviðgera skipast?
- Hvussu ofta eigur viðgerðartrygdin hjá einum dátuviðgera at kannast?
- Hvussu við viðgerðartrygdini hjá undirdátuviðgerum?

---

[1] Vegleiðingar og skabelónir - Dátueftirlitið (dat.fo)
[2] https://www.dat.fo/fyritokur-og-stovnar/vidgerdartrygd/

# 2. Hví er neyðugt at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum?

Ein dátuábyrgdari hevur ábyrgdina av, at dátuverndarlógin verður hildin. Hesa ábyrgd hevur dátuábyrgdarin óansæð um dátuábyrgdarin sjálvur viðgerð upplýsingarnar ella um ein dátuviðgeri viðgerð upplýsingar fyri dátuábyrgdaran.

Tað er ikki ítøkiliga ásett í dátuverndarlógini, at dátuábyrgdarin skal hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum. Men fatanin hjá Dátueftirlitinum er, at ein dátuábyrgdari ikki kann lúka krøvini í dátuverndarlógini uttan at hava slíkt eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerunum.

Hendan fatan er m.a. grundað á, at dátuábyrgdarin skal fylgja kravinum um ábyrgd og skal kunna vísa á, at viðgerð av persónupplýsingum fer fram í samsvar við dátuverndarlógina. Hendan skyldan krevur meiri av dátuábyrgdaranum enn “bert” at fáa í lag eina dátuviðgeraravtalu við dátuviðgeran. Dátuábyrgdarin eigur eisini at hava eftirlit við, at dátuviðgeraravtalan verður hildin, og eigur tí at eftirkanna, at dátuviðgerin hevur gjøgnumført øll tøknilig og bygnaðarlig trygdartiltøk, sum er avtalað.

# 3. Hvør kann hava eftirlit við viðgerðar-trygdini hjá einum dátuviðgera?

Dátuverndarlógin ásetur ikki formkrøv til, hvussu eftirlitið við dátuviðgerum skal fara fram.

Yvirskipað hevur ein dátuábyrgdari tveir møguleikar at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerum. Dátuábyrgdarin kann

1) sjálvur hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerunum ella
2) velja ein óheftan triðjapart (t.d. grannskoðara) at hava eftirlit við viðgerðartrygdini hjá dátuviðgerunum.

Hvussu eftirlitið við dátuviðgera fer fram, er treytað av ymiskum viðurskiftum. Í fyrstu syftu er neyðugt at meta um hvussu samansett (kompleks) dátuviðgerarskipanin er. Harnæst er avgerandi at fáa greiðu á, um dátuábyrgdarin er førur fyri, t.e. hevur skikkað starvsfólk við neyðugari vitan um t.d. KT-trygd, at hava eftirlit við, at dátuviðgerin fremur tey tøkniligu og bygnaðarligu trygdartiltøkini, sum eru neyðug, og sum vóru avtalað.

Um dátuviðgerarskipanin er einføld, kann dátuábyrgdarin, hóast hann ikki hevur holla vitan um t.d. KT-trygd, sameina báðar nevndu møguleikarnar. Dátuábyrgdarin kann fáa sær hjálp frá uttanhýsis ráðgevum (t.d. grannskoðara, sakførara) til at orða ítøkiligar spurningar, hesar spurningar kann dátuábyrgdarin síðani seta dátuviðgeranum, og soleiðis hava eftirlit við viðgerðartrygdini.

Velur ein dátuábyrgdari at brúka ein óheftan triðjapart, er týdningarmikið, at dátuábyrgdarin tryggjar sær, at hesin hevur veruligt eftirlit við, at dátuviðgerin fremur tey avtalaðu trygdartiltøkini.

# 4. Hvussu kann eftirlit við viðgerðar-trygdini hjá einum dátuviðgera skipast?

Sambært § 46 í dátuverndarlógini skulu dátuábyrgdari og dátuviðgeri fremja hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til váðarnar, sum standast av viðgerðini. Sambært § 41, stk. 2, nr. 4 skal dátuviðgeraravtalan áseta, at dátuviðgerin skal fremja tey tiltøk, ið eru kravd sbrt. § 46.

Trygdarstøðið, sum ein dátuviðgeri skal halda, er treytað av váðametingini[3], sum dátuábyrgdari og dátuviðgeri hava gjørt, og har hædd er tikin fyri váðunum, ið viðgerðin av persónupplýsingunum hevur fyri skrásetta. Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu sostatt, áðrenn viðgerðin byrjar, taka støðu til, hvørji trygdartiltøk eru neyðug at fremja. Henda støðutakan skal síggjast aftur í dátuviðgeraravtaluni millum partarnar.

Dátuábyrgdarin kann tí taka útgangsstøði í ítøkiligu dátuviðgeraravtaluni og gera eina ætlan fyri eftirlitið grundað á trygdarstøðið, sum er lýst í avtaluni.

Eftirlitið við einum dátuviðgera kann gerast sum vitjan á staðnum, men kann eisini gerast við at savna skjalfestar upplýsingar o.a.

Leisturin, sum dátuábyrgdarin velur at hava eftirlit eftir, er treytaður av eyðmerktu váðunum, sum eru lýstir í váðametingini. Um váðin fyri rættindunum hjá tí skrásetta er stórur, kann verða neyðugt at hava eftirlit á staðnum. Um váðin hinvegin er lítil, kann vera nøktandi at hava skrivligt eftirlit.

Eftirlit har dátuábyrgdarin kemur á staðið har dátuviðgerin viðger persónupplýsingarnar, skal endurspegla tær vandastøður, sum eru staðfestar í váðametingini. Tað kann t.d. vera, at dátuábyrgdarin í síni váðameting hevur ásett eftirlit á staðnum, sum eitt trygdartiltak sum avmarkar váðan. Tað kann eisini vera, at stakroyndir bert kunnu gerast við eftirliti á

[3] Vegleiðingar og skabelónir - Dátueftirlitið (dat.fo)

staðnum. Tað kann eisini vera, at dátuábyrgdarin meiri yvirskipað í mun til sítt váðagrundaða trygdararbeiði, hevur mett at eftirlit á staðnum er tann besta loysnin.

Dømi um viðurskifti í váðametingum, sum tala fyri eftirliti á staðnum, kunnu vera tørvur á at:

- Kanna rættindi hjá brúkarum
- Kanna atgongd til persónupplýsingar
- Kanna ítøkiligar uppsetingar og stillingar
- Kanna ítøkilig tøknilig trygdartiltøk
- Kanna álagdar reglur um at strika upplýsingar
- Kanna fysiska trygd

Eitt skrivligt eftirlit kann t.d. fevna um, at dátuviðgeri eftir umbøn ella regluliga sendir frágreiðingar um avgerandi viðurskifti sambært váðametingini. Partarnir kunnu t.d. eisini hava avtalað, at dátuviðgerin fyri egna rokning verður skoðaður av óheftum 3-parti, og at hendan skoðan verður send dátuábyrgdaranum.

# 5. Hvussu ofta eigur viðgerðartrygdin hjá einum dátuviðgera at kannast?

Tað er viðkomandi at spyrja, hvussu ofta tað er neyðugt hjá einum dátuábyrgdara at kanna viðgerðartrygdina hjá sínum dátuviðgerum, og svarið er treytað av váðametingini, sum er gjørd.

Títtleikin skal vera hóskandi í mun til eyðmerkta váðan. Um váðin fyri rættindini hjá teimum skrásettu er stórur, kann gerast neyðugt at kanna viðgerðartrygdina hjá dátuviðgerum árliga ella hálvárliga. Er váðin hinvegin lágur, kann tað eftir umstøðunum vera nøktandi at kanna viðgerðartrygdina meiri sjáldan.

Í einum kt-umhvørvi við stórari og broytiligari menning og har kt-kervið er fyri skiftandi váðastøðum, er tørvur á títtum og meiri málsøknum eftirliti. Er talan hinvegin um eitt støðugt kt-umhvørvi, har váðarnir eru kendir og ikki sveiggja stórvegis, nýtist eftirlitið ikki at vera eins títt og málsøkið.

# 6. Hvussu við viðgerðartrygdini hjá undirdátuviðgerum?

Um ein dátuábyrgdari góðkennir, at ein dátuviðgeri brúkar ein annan dátuviðgera (ein undirdátuviðgera), skal dátuviðgerin áleggja undirdátuviðgeranum somu dátuverndarkrøv, sum hann sjálvur skal halda. Tað er sostatt dátuviðgerin, sum í útgangssstøðinum skal tryggja, at ein undirdátuviðgeraravtala verður gjørd við undirdátuviðgeran.

Kravið, um at hava eftirlit við viðgerðini av persónupplýsingum hjá einum undirdátuviðgera, er ikki ítøkiliga ásett í dátuverndalógini. Dátueftirlitið metir tó ikki, at dátuábyrgdarin kann halda dátuverndarlógina, um hann ikki veit um undirdátuviðgerin virkar innan fyri karmarnar á undirdátuviðgeraravtaluni (og hervið upprunaligu dátuviðgeraravtaluni).

Praktisku møguleikarnir fyri eftirliti við undirdátuviðgera, og hvat nøktandi eftirlit er í eini ítøkiligari støðu, eigur at viðgerast eftir somu meginreglum, sum eftirlitið við dátuviðgerum, sum áður er nevnt.

Dátuviðgerin hevur tó ábyrgdina mótvegis dátuábyrgdaranum av, at undirdátuviðgerin heldur tey ásettu dátuverndarkrøvini. Dátuábyrgdarin skal tryggja sær, at dátuviðgerin hevur tað avtalaða eftirlitið við undirdátuviðgerunum. Hetta kann t.d. gerast við at dátuviðgerin sendir dátuábyrgdara skjalfesting fyri gjørt eftirlit.

# 7. Mannagongd hjá dátuábyrgdara fyri eftirlit við dátuviðgera

Dátuábyrgdarin skal hava mannagongdir fyri eftirlitinum av viðgerð av persónupplýsingum, sum er latin dátuviðgeranum[4]. Mannagongdir skulu hóska seg til váðarnar fyri viðgerðini og hesar mannagongdir skulu framganga í dátuviðgeraravtaluni millum partarnar.

Hvussu eftirlitið skal fara fram, veldst um váðan, sum er við viðgerðini. Áðrenn dátuviðgeraravtalan verður undirskrivað, skulu partarnir sostatt taka støðu til, um viðgerðin hevur við sær ein lítlan, miðal ella stóran váða fyri tann skrásetta. Er váðin lítil – t.d. tí einans navn og bústaður hjá fáum skrásettum verða viðgjørd – er ikki neyðugt við umfatandi eftirliti. Er váðin hinvegin stórur – t.d. tí viðkvæmar persónupplýsingar verða viðgjørdar um nógv skrásett - skal eftirlitið verða meiri nágreiniligt.

**Dømi 1 – Lítil váði**

Dátuviðgerin, Sp/f Dátugreining skal lata dátuábyrgdaranum, Uttaru Kommunu, allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at dátuviðgeraravtalan verður hildin. Dátuviðgerin skal árliga lata dátuábyrgdaranum skrivliga frágreiðing um viðgerðina av persónupplýsingum. Hetta kann t.d. fevna um møguligar broytingar í skipanini, talið av møguligum trygdartiltøkum o.s.fr.

Dátuábyrgdarin kann fremja kanningar av støðum, har sum dátuviðgerin viðgerð persónupplýsingar. Dátuábyrgdarin rindar møguligar útreiðslur, sum standast av kanningini. Dátuviðgerin hevur tó skyldu at hjálpa til, um tað er neyðugt. Dátuviðgerin skal seta tíð av til hetta.

[4] Standard dátuviðgeraravtala pkt. C7, Vegleiðingar og skabelónir - Dátueftirlitið (dat.fo)

**Dømi 2 – Miðal váði**

Dátuviðgerin, P/F Helluhýsing skal lata dátuábyrgdaranum, P/F Eystur fysioterapi allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at dátuviðgeraravtalan verður hildin. Dátuviðgerin skal árliga lata dátuábyrgdaranum skrivliga frágreiðing um viðgerð av persónupplýsingum, sum er farin fram, (líka sum dømi 1)

Dátuábyrgdarin ella umboð hansara kunnu frá miðjan september til síðst í september fremja kanningar av støðum, har sum dátuviðgerin viðgerð persónupplýsingar. Í hesum sambandi kunnu støð og skipanir, sum vera nýtt í viðgerðini, kannast fyri at gera av, um dátuviðgerin heldur dátuverndarlógina, aðra lóggávu um dátuvernd og dátuviðgeraravtaluna.

Afturat nevndu kanningum kann dátuábyrgdarin gera kanningar hjá dátuviðgeranum, tá dátuábyrgdarin metir tað vera neyðugt. Dátuábyrgdarin kann eisini krevja, at óheftur triðipartur ger frágreiðingina um viðgerð fyri at staðfesta um dátuviðgerin heldur dátuverndarlógina, aðra lóggávu og hesa avtalu.

Dátuábyrgdarin rindar fyri møguligar útreiðslur, sum standast av kanningini. Dátuviðgerin hevur tó skyldu at hjálpa til, um tað er neyðugt. Dátuviðgerin skal seta tíð av til hetta.

**Dømi 3 – Stórur váði**

Dátuviðgerin, P/F Dátuhýsing, skal fyri egna rokning útvega eina árliga váttan frá óheftum triðjaparti um dátuviðgerin heldur dátuverndarlógina, aðra lóggávu um dátuvernd og hesa avtalu.

Váttanin skal uttan óneyðugt drál sendast dátuábyrgdaranum, Limafelagið Sálarbótin, til kunningar. Dátuábyrgdarin kann seta seg ímóti fortreytunum ella háttinum, ið kanningin er gjørd eftir, og kann í slíkum førum biðja um eina nýggja kanning undir øðrum fortreytum.

Grundað á niðurstøðurnar í kanningini kann dátuábyrgdarin biðja um, at fleiri tiltøk verða sett í verk fyri at tryggja, at dátuverndarlógin, onnur viðkomandi lóggáva og dátuviðgerðaravtalan verða fylgd.

Dátuábyrgdarin ella umboð hansara kunnu harumframt fremja kanningar, undir hesum kanningar á staðnum har viðgerðin fer fram. Í hesum sambandi kunnu støð og skipanir, sum vera nýtt í viðgerðini, kannast. Hesi eftirlit kunnu fara fram, tá dátuábyrgdarin metir tað vera neyðugt.

**Vegleiðing**

© 2021 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:

Dátueftirlitið

Reyngøta 33

100 Tórshavn

Tlf: 309100

dat@dat.fo

dat.fo

Dátueftirlitið